# Til fyrireikandi felag til estetiska steypakapping

Stóra takk fyri, at tit samskipa kappingina 😊! Her er eitt yvirlit yvir, hvat skal gerast í hesum sambandi.

**Dagin fyri kappingina**

Tit fáa boð um, nær tit sleppa inn í høllina at gera klárt. Hetta er tað, ið skal gerast kvøldið fyri kappingina:

- Dustsúgva kappingargólvið. Hetta kann vera við egnum dustsúgvara ella við einum, sum er í høllini (hesir rigga tó ikki altíð).
- Seta stólar til linjuverjar.
- Gera heiðursportur úr ballónum.
- Skriva hesi A4 skelti: STØKK; LJÓSIÐ; HF; KLAKSVÍKAR FIMLEIKAFELAG; DÓMARAR (hesi skulu klistrast á skiftirúm og dómararúm).
- Avleggja plass mitt fyri á áskoðaraplássunum til KVF sum stroymir frá kappingini.
- Seta puffar frá FIMI upp til høgru fyri bakteppið til fimleikararnar at sita á eftir framførslu, við plássi fyri minst 10 íðkarum.
- Kannið eftir, at bakteppið er hongt upp. Um hallarvørar hava gloymt tað, minnið teir á tað.

**Á kappingardegnum**

Til sjálvan kappingardagin skulu tit hava:

- Tveir tíðtakarar, ið eru 18 ár ella eldri.
- Trý børn ið eru 12 ár ella eldri (og ein afturat til kappingina hjá ungl/kvinn) at bera seðlar til dómarar.
- Tveir linjudómarar ið eru 18 ár ella eldri.
- Fýra skeltiberar í búna. Hetta kann vera tey somu sum bera seðlar.
- Tvey fólk sum leiða liðini á gólvið.
- Tvey fólk at selja atgongumerki.
- Onkran at dustsúgva teppið eftir royndarvenjing um morgunin – Hetta kann vera við egnum dustsúgvara ella við einum, sum er í høllini (hesir rigga tó ikki altíð).
- Tvey fólk at gera kaffi og te til dómarar, at seta mat og vatn fram og rudda burtur aftur. Samsýning á 2.000 kr fæst fyri hesa uppgávuna. Hetta er frá morgunstundini, tá dómararnir koma at hyggja at royndarvenjing. Tá skal kaffi/te vera klárt.

Tíðtakarar, seðlaberðarar, linjudómarar, skeltiberar og tey ið leiða liðini inn á gólvið skulu møta og vera klár hálvan tíma áðrenn kappingin byrjar.

**Føroya Fimleikasamband**
Á Frælsinum 30, FO-100 Tórshavn
Teldupostur: fimleikur@fimleikur.fo

Tey, ið taka fyri atgongumerki, skulu møta hálvan annan tíma áðrenn kappingin byrjar. Tey fáa kassa, terminal og stempul frá aðalskrivaranum hjá Fimleikasambandinum.

GG: Tit eru vælkomin at hava smásølu undir kappingini, men hendan skal vera úti í gongini, og ikki inni í høllini, har kappingin er. Hetta tí tað annars órógvar meðan kappingin er í gongd.

## Eftir kappingina

Eftir kappingina skal alt ruddast av.

- Høllin (skrell, borð og stólar)
- Teppið skal rullast rætt saman aftur á rullurnar, ið hoyra til.
- Umklæðingarrúm
- Venjingarrúm
- Dómaraborð

Um tit annars hava nakrar spurningar, eru tit vælkomin at senda ein teldupost til fimleikur@fimleikur.fo ella ringja til fimleikasambandið á tlf 919919.

**Føroya Fimleikasamband**
Á Frælsinum 30, FO-100 Tórshavn
Teldupostur: fimleikur@fimleikur.fo